## Henke klárur til landsliðið

Henrik Larsson, er klárur at spæla fyri svenska landsliðið, um landsliðsvenjarin, Lars Lagerbäck, ringir til hansara undan HM-dystinum ímóti Portugal 28. mars. – Ringir venjarin, eri eg til reiðar at taka upp kappingina við hinar á landsliðnum um plássið, tí eg haldi tað vera stuttligt at spæla á landsliðnum, sigur hann í samrøðu við Sportspegeln. Júst nú er hann við Helsingborg á venjingarlegu í hitanum í Suðurafrika.



## Eitt tap kann geva uppsøgn

Svenski landsliðsvenjarin hjá Mexiko, Sven-Göran Eriksson, stúrir fyri næsta dystinum í HM-undankappingini, sum verður ímóti Costa Rica tann 28. mars. – Um vit ikki vinna, fer at leika hart á hjá mær, og kanska verður tað endin, sigur Eriksson við Sky Sports. Mexikanska fótbóltssambandið hevur sagt, at tað stuðlar svenskaran fult út, men Sven-Göran Eriksson vísir á, at tað kann skifta so skjótt, tí altavgerandi er fyri Mexiko at koma við til HM-endaspælið í Suðurafrika í 2010.

## Annika Vang nøgd við stigini

**Hóast 19 ára gamla Annika Vang ikki skeyt, sum hon plagar til HM, so er hon sjálv rímiliga væl nøgd við úrslitið hjá sær sjálvari**

BOGASKJÓTING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Serliga tíðliga í kappingini sá onki út hjá Anniku Vang, men út á dagin gekk frægari og tá liðugt var, hevði hon 536 stig, sum er rættiliga langt undir tí, hon plagar at hava. Hinvegin var tað ikki bara sum at siga tað at sleppa millum 32 tey bestu, sum sleppa at skjóta finaludystir, tí har var kravið 555 stig, og tað er ikki ofta, at Annika Vang er har uppi.

- Tað gekk betri enn seinast, og eg eri rímiliga nøgd við stigini, sigur Annika Vang, sum eisini var til innandura HM fyri fýra árum síðani, tá tað var í Aalborg. Í ár var tað í Rzeszow í Póllandi.

Annika Vang luttók í bólkinum recurve kvinnur og gjørdist – við sínum 536 stigum av 600 møguligum – nummar 42 í heiminum innandura.

Støðið á kappingini var hægri enn tað nakrantíð hevur verið, og tann, ið hevði mest stig innleiðandi hevði 592 stig. Hetta er nýtt heimsmet fyri kvinnur á 18 metrum.

Við øðrum orðum var Annika Vang liðug í HM innandura 2009, og kann kalla seg kvinnu nummar 42 í heiminum í recurvebólkinum.



# Magnus Andreassen nummar tíggju til HM




*16 ára gamli Magnus Andreassen úr Runavík gjørdist nummar tíggju til HM í Póllandi, men tá Sosialurin tosaði við hann, var hann á veg í skúla í tíggjunda flokki*

**16 ára gamli Magnus Andreassen gjørdist fríggjadagin nummar tíggju til HM fyri compoundskjúttar undir 19 ár. Hóast hann fegnast um góða úrslitið, so ilskast hann inná, at hann ikki megnaði at vinna tann eina dystin, tí tann hann tapti ímóti toppaði í dystinum móti sær**

BOGASKJÓTING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tá innleiðandi kappingin til innandura HM í Rzeszow í Póllandi var liðug hósdagin, var Magnus Andreassen nummar 15 í compoundbólkinum fyri skjúttar undir 19 ár.

Hetta var hann kom fram til eftir eina trilvandi byrjan, har tað ikki ordiliga gekk eftir ánni. Men tað skilst, at Magnus Andreassen fekk ein riffil frá Jógvan Magnusi Andreasen, ið var liðleiðari á túrinum, og eftir hetta skeyt Magnus Andreassen líka væl, sum hann plagar at gera í Føroyum.

- Hann bað meg taka meg saman og ikki vera óðan. Tað gjørdi eg so, og so gekk sum eftir ánni, sigur Magnus Andreassen, sum leggur dent á, at tað ikki er ofta, at hann skal bukast upp á pláss. Og hann er skjótur at leggja afturat, at Jógvan Magnus Andreasen var fínur at hava við.

### Væl nøgdur

- Eg haldi, eg eri væl nøgdur. Tað kundi gingið betri ímóti svianum, men eg haldi eg eri nøgdur við tíggjunda pláss, sjálvandi hevði tað verið stuttligari at komi í finaluna. Og eg hevði klárað tað betri enn teir, sum skutu í finaluni, greiðir Magnus Andreassen frá, sum í áttandapartsfinaluni tapti við einum stigi – 115-116 – ímóti einum svia, ið lá nummar tvey innleiðandi, og sum eisini endaði nummar tvey í kappingini.

### Boðin til Danmarkar

So skjótt kappingin var liðug, kom ein leiðari í einum donskum felagið og bjóðaði 16 ára gamla føroyska skjúttanum til Danmarkar at skjóta saman við teimum, tí hann er á so góðum støði.

Schandorff Vang, ið var dómari til kappingina greiðir somuleiðis frá, at sviar vóru sera sannførdir av 16 ára gamla runavíkinginum.

- Eg veit ikki um eg fari av landinum, men alt kann henda, sigur Magnus Andreassen, sum var á veg í skúla, tá Sosialurin fekk orð á hann.

### Fín kapping

Ungi runavíkingurin er somuleiðis sera væl nøgdur við umstøðurnar til kappingina.

- Har var øgiliga gott ljós, og tað ger beinanvegin, at mann sær nógv betri í siktinum. Tá vit vandu var tað í einum myrkari hølum, og tað ávirkaði skjótingina hjá mær, fortelur Magnus Andreassen. Sum tó heldur, at tað kanska var í so trongt hjá áskoðarunum.